# Tað ótrúliga ger innrás

Seinastu tíggju árini hevur Edward Fuglø við jøvnum millumbili skrivað og myndprýtt barnabøkur, og Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur júst givið út sættu bókina, Gloria og Soria Moria. Í bókunum sameinir fjøllistamaðurin myndlistina og orðlistina til hugtakandi og poetiskar søguheimar, har listin – við øllum sínum fjølbroytni – fær rúm.



Edward Fuglø, listamaður

Tekstur: Silja Aldudóttir  Mynd: Katy Hammer

UMRØÐA. Myndlistarliga hava bøkurnar hjá Edwardi Fuglø ein eyðkendan stíl, og bøkurnar hava eitt afturvendandi snið. Tær eru 31x22 cm til støddar og hava somu uppseting við teksti á vinstru síðu og mynd á høgru. Litirnir eru í nógvum førum myrkir og mettaðir, men tað káma, fínliga og bjarta spælir altíð uppímóti. Litsamansetingin er spenningsfull og sansalig. Myndevnini eru altíð figurativ og lýsa neyvt høvuðshendingar í tekstinum, hóast teksturin sigur frá meiri enn tí, sum rúmast í myndunum. Í støðum leggja myndirnar tó eisini okkurt aftur at frásøgnini, sum ikki er í tekstinum. Í bókunum eru nógvir smálutir, smáar skreytmyndir og mynstur, sum prýða og eru við til at pallseta rammurnar í søguni. Myndirnar eru í stóran mun heildar– ella totalmyndir, sum vísa persónar í fullari støðd og ein part av umhvørvinum. Myndirnar eru listarligar og poetiskar, tekstirnir eru samansettir, og hvørki myndir ella tekstir undirmeta lesaran.

## Ritverkið

Navnið á gomlu konuni í tí fyrstu bókini, sum kom út, Apollonia (2007), er ikki langt frá navninum á grikska skaldagudinum, Apollon. Hon elskar tann klassiska skaldskapin, men hon hevur eisini tikið eyðkenni hansara til sín: tann stranga formin og tamarhaldið. Men tá ið hon trínur inn í leikirnar hjá Shakespeare, sleppir Apollonia tamarhaldinum og blómar sum ein onnur Dionysa. Janus er ein stjørna (2009) hevur ein klassiskan dám, tí hon spælir við tær stóru episku og mytologisku sjangrurnar. Hetta er ein bók, sum á elegantan og óbeinleiðis hátt nertir við deyðan. Vampýrella (2011) er ein original og spennandi barnaræðusøga um tannáringin úr sjónarhorninum hjá barninum. Poetikus (2012) snýr seg um einsemi og at vera øðrvísi. Men søgan er ikki svartskygd, tí í teirri ósannlíku trioini við serskøltinum, havfrúnni og pappageykinum myndast ein lítil oasa við fiólspæli, sangi og gleði. Í SimmSalaBimm (2014) verður ein keðiligur regndagur knappliga fullur í gandi. Kaspar keðir seg illa, fer upp á ovastaloft og finnur gandastavin, Timmilimm, sum hevur andlit og mannamál. Enska tiltakið, idle hands are the devil's plaything, rennur lesaranum í hug, tí nú kveikist ein neisti í Kaspari, og ruðuleikin byrjar.

Bøkurnar hava allar ein yvirskipaðan bygnað í felag, sum er, at tað yvirnatúrliga brýtur inn í tilveruna hjá søgupersónunum. Yvirnatúrligir heimar við mýtologiskum verum, skaldskapi, tónleiki og gandi taka seg upp, og søgupersónarnir verða tá noyddir at taka av avbjóðingum, vísa dirvi og at nýta sínar kreativu eginleikar. Hesin gjøgnumgangandi bygnaðurin verður tó pallsettur á ymiskan hátt, tí sambondini millum tann veruliga heimin og ein annan heim eru ymisk. Í Apollonia og Vampýrella er tað yvirnatúrliga bara ein dreymur. Í Poetikus renna tann veruligi heimurin og tað yvirnáturliga saman til ein nýggjan veruleika. Í Janus er ein stjørna verður Janus verandi í tí yvirnatúrliga heiminum. Í SimmSalaBimm hvørvur gandurin brádliga, men ein feril av gandinum hongur eftir. Í Gloria og Soria Moria fylgja lutir úr tí yvirnáturliga heiminum við inn í tann veruliga. Bøkurnar spæla við ta fantastisku sjangruna, furðuna, og tær lata markið ímillum dreym, gand og veruleika vera ógreitt. Við bygnaðinum fylgir eitt tema, sum snýr seg um at hava skapanarhug og dirvi, sum undir teimum røttu – magisku – umstøðunum sleppa at blóma. Skapan og list hava ein sentralan leiklut í ritverkinum, og talan er um alskyns list sum skaldskap, myndlist, tónlist, leiklist umframt gand og sirkusframførslur. Søgurnar verða flættaðar saman við leikrit eftir William Shakespeare, grikska og norrøna mýtologi og ævintýr. Bøkurnar sipa til persónar og hendingar í hvørjum øðrum, og ritverkið byggir soleiðis spakuliga ein lítlan alheim, har tað ótrúliga í heilum ger innrás.

## Gloria og Soria Moria

Í Gloria og Soria Moria droymir Gloria um at vera sirkusgenta, og tá ið hon hoppar á trampolinini í garðinum hjá abbanum, loypur hon inn í ein eksotiskan heim. Sandslottið, Soria Moria, og drotningin, Fatamorgana, hava brúk fyri hjálp, og við kynstrum og dirvi megnar Gloria at bjarga teimum. Bókin byggir á drøg úr einum norskum ævintýri um tað hvørvandi slottið, Soria Moria, men Edward Fuglø broytir bæði staðseting og innihald og skrivar eina nýggja søgu. Málið verður drigið fram á ein skemtiligan hátt, og ein millumtekstlig heilsan tykist at vera til Tårnet ved verdens ende hjá Williami Heinesen, har tulipanir og hyasintir verða til sintipanir og tulihyir, tí Gloria møtir eitt nú giramelum og tikopardum á síni ferð. Tann eksotiski heimurin verður málaður fram við intensum og frískligum litum, sum eisini kámast til fínligar pastelllitir. Samansetingin av tí heita, ljósareyða litinum og teimum svalligu bláu og grønu er ógvuliga sansalig. Tann hvíti liturin verður nýttur á ein hátt, sum ger, at myndirnar tykjast at glógva og glitra, eitt nú á permuni, har Gloria sveiggjar oman fyri Soria Moria. Á síðstu myndasíðuni sæst, at spámaðurin, Oligar, er abbi Gloriu, men hetta verður ikki nevnt í tekstinum. Hetta fær enn einaferð okkum lesarar at ivast og undrast. Markið millum tað veruliga og óveruliga er alt annað enn greitt, og tað er júst soleiðis, tað skal vera.